## Venjarin mátti lúgva



Cesare Prandelli, sum er venjari hjá italska felagnum Fiorentina, kendi seg noyddan lúgva fyri sínum spælarum í hálvleikinum av dystinum ímóti Treviso leygardagin. Hann segði, at Roma, sum Fiorentina kappast við um eitt Champions League-pláss, var aftanfyri 3-0 ímóti Palermo, og tí skuldi Fiorentina bara vinna dystin fyri at fara fram um Roma. Úrslitið var, at Fiorentina tók seg saman í seinna hálvleiki og vann dystin ímóti Treviso. Hinvegin var Roma á odda 3-0 ímóti Palermo í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki javnaði Palermo púra óvæntað, og so fór Fiorentina fram um Roma hóast alt.

– Eg segði ósatt fyri spælarunum, so at teir fingu rætta hugburðin til seinna hálvleik av dystinum, segði Fiorintina-venjarin eftir sigurin.

## Málmaður fekk skaða í køkinum

Málmaðurin hjá AGF, Steffan Rasmussen, mátti geva avboð til dystin í superliguni í gjár. Orsøkin var, at han heði skorið seg heima í køkinum, tá ið hann var í ferð við at gera mat um páskirnar. Málmaðurin skar seg í bæði peikifingurin og tummulfingurin, og hann var tí ikki førur fyri at spæla ímóti Viborg í gjár.

EB/Streymur-ÍF 2-0 (0-0):

# Í evstu løtu

EB/S

ÍF



*Fuglfirðingar hildu fast í stiginum í 89 minuttir skírisdag, men tað hjálpti lítið, tá EB/Streymur kortini skoraði tvey mál móti dystarenda*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**Við tveimum málum í seinastu minuttunum vissaðu heimamenninir sær, at teir vóru einasta liðið, sum fór inn í halguna við fullum stigatali**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað tykist, sum meina teir hjá EB/Streymi nakað heilt alvorligt við liðnum í ár. Seinnu árini hevur liðið av álvara amast upp móti oddinum, men enn hevur seinasta fetið restað. Eitt fet, sum tó nú tykist vera væl áleiðis. Ikki minst tí liðið nú eisini tykist vinna teir dystirnar, har tað leikar javnt á. Ein dygd, sum serstakliga vantaði fyrru hálvu í fjør, har hópatals heimadystir endaðu við javnleiki.

Ein endurminning av hesum tóktist ikki vera langt av leið, tá ÍF var á vitjan. Talan var sum so ikki um tað heilt flótandi fótbóltsspælið, men teir møguleikar, sum vóru, tóktust tó at fella til heimaliðið.

Gestirnir vóru sjónliga komnir fyri at halda fast um stigið, sum teir høvdu, tá farið varð á vøllin, og hetta tóktist eisini eydnast. Ikki minst tí heimaliðið sýndi lítið hugflog, og fyri tað nógva satsaði upp á langar bóltar fram til áleyparanar, sum vórðu hildnir í stuttum tjóðuri av kropssterku ÍF-verjuni.

Fram til seinasta minuttin stóð framvegis á jøvnum, og ein stútari á tvørtræið skuldi helst verða tað nærmasta, sum EB/Streymur kom einum sigri. Men so tók Hans Pauli Samuelsen sakina í egnar í hendur. Í eyðkendum stíli dróg hann seg leysan av verjuni, áðrenn hann legði bóltin yvir í handara síðunet til 1-0.

Hetta kom sjálvandi sum vátur vøttur hjá fuglfirðingunum, sum nú fullu púrasta í fátt. Tað gav samstundis rúm hjá vertunum at spæla, og teir fýra minuttirnar, sum lagdir vórðu afturat, eydnaðist tað eisini Jóhann á Stongum at økja um leiðsluna til 2-0.

Og so var fagnaðurin kring Mølina ovurhonds stórur. Áskoðararnir vistu av, at dysturin í Havn var endaður við javnleiki, og við sigrinum hevði EB/Streymur soleiðis lagt seg einsamalt á odda í bestu deildini. Og tað man vera fyrsta ferðin yvirhøvur, at tað er komið fyri seg.

---

NSÍ-B68 1-1 (0-1):

# Toftamenn tóku sín part

NSÍ

B68

**NSÍ hevði aftur hesa ferð torført við at undirstrika, at tað er veruleiki aftanfyri, tá ið teir droyma um toppplasering**

NSÍ-B68
*Jóannes Hansen*

NSÍ hevur ilt við at liva upp til tað, sum teir í Runavík undan kappingarbyrjan løgdu á seg sjálvar. Tað sást aftur í grannauppgerðini við Løkin, har B68 vitjaði. Har var tað ferðmikið, kontant og harvið høgur intensitetur og gott undirhald. Petur Reinert var 23. maðurin á vøllinum, og hann megnaði sera væl at halda skil á sum góður skúlalærari, uttan at tað nýttist honum at tveita um seg við kortum.

Toftamenn vóru eitt vet grammari enn heimamenninir. Á sentrala miðvøllinum vóru tað meiri Ralph van Door, Jann Ingi Petersen og Kári Hansen, sum stríddist sum leyva móti gomlu liðfeløgunum hjá sær, ið settu dagsskránna, enn tað vóru teir á NSÍ miðvøllinum, sum høvdu tað eitt sindur torført í nærdystunum.

Øssur Hansen er framvegis fínur fótbóltsspælari, og sum heild hekk spælið betri saman hjá gestunum, enn tað gjørdi hjá NSÍ

NSÍ hevur nógv fólk, og hesa ferð høvdu teir broytt uppstillingina eitt sindur. Jóhan Troest Davidsen, sum sat uttanfyri í Vági, var á høgra vongverja, og Brynjolvur Nielsen var hesa ferð verjukendi miðvallarin aftanfyri Dánial Hansen og Boga Løkin. Sjúrður Jacobsen var vongverji í vinstru fyrstu løtuna, inntil hann noyddist at gevast av skaðaávum, og 18 ára gamli Einar Hansen kom inn á vongverjan.

Heimaliðið kundi havt fingið mál beinanvegin. Tórur Thomsen tóktist at vera eitt sindur áhælsin, og Brynjolvur Nielsen, sum støðan tóktist koma eitt sindur óvart á, lyfti upp um málverjan og upp um tóma málið.

Stutt undan steðginum fekk B68 mál. Súni Fríði Barbá, sum var einsamallur á toppinum, meðan Kristian Anton Andreasen og Jóhan Petur Poulsen vóru ytstir í miðvallarborðunum, fekk tak á framlegging frá Jann Inga Petersen, ið var rættuliga eyðsýndur, bólturin tók í onkran og snýtti Jens Martin Knudsen, og so vóru fyritreytirnar hjá B68 í 2. hálvleiki uppaftur betri.

NSÍ hevði bóltin mesta partin av 2. hálvleiki. Teir royndu at leggja trýst á, men tað var ikki stór tyngd og broddur í, og málmøguleikarnir vóru fáir og smáir. B68 verjan hevði gott tak á, og tað hjálpti teimum, tá ið heimaliðið ofta fall í grøvina at royna við longum sendingum fram til Christian Høgna Jacobsen. Tað var barnamatur hjá Arnbirni Danielsen og Ova Magnussen.

Korter undan leikloki fingu teir í NSÍ nyttu burturúr hornasparksinnleggi. Innskifti Sonni L. Petersen setti krúllin undir bóltin, og so var mál og eitt stig í part.

NSÍ skifti í seinna umfarinum skjótar og konditiónsstinnar spælarar inn. Onkrir av B68 monnunum tóktust síðstu løtuna moyrari enn gott er, men tað ávirkaði ikki úrslitið. 1-1 og eingin ivi um, at tey niðanfyri vøllin fóru betri nøgd til hús, enn tey omanfyri vøllin vóru. tað.